

# Til verju móti fuglakrími

**Hóast lítil møguleiki er fyri at menniskju kunnu verða smittað við fuglakrími, so verða kortini tikin til at tryggja føroyingum ímóti hesi sjúkuni. – Fuglakrím kann koma við flytifugli í vár, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni**

FUGLAKRÍM
*Snorri Brend*

Hóast fuglakrím enn ikki er staðfest her á landi, so er neyðugt at verða til reiðar tá ella um hetta fer at henda.

Landsdjóralæknin tekur í øllum førum hetta málið í størsta álvara, og hevur nú sett fram sína meting av støðuni her á landi.

Arbeitt verður í løtuni við eini kunnugerð um, hvussu ein kann skráseta heimafugl.

Í øðrum lagi er ein kunngerð á veg um, hvussu ein kann vaka yvir og berjast ímóti fuglakrími, um tað gerst aktuelt her á landi.

Kunngerðin um skrásetingina vil m.a. tryggja, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur allar upplýsingar um, hvar og hvussu nógvur heimafuglur finst í Føroyum.

– Á enda hátt kunnu vit skjótt og væl finna fram til tey støðini við heimafugli, har ein skal seta í verk verjutiltøk og tiltøk fyri at berja niður hesa sjúkuna, verður sagt.

Ein partur av hesum arbeiðinum er gjørt í samsvari við tær reglur, sum eru gjørdar í øðrum europeiskum londum.

### Nógvur flytifuglur

Enn er eingin tilburður fráboðaður av fuglakrími. Men tað kann so skjótt verða.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan er sjálvandi áhugað í at fáa allar upplýsingar um hetta, um so er at fólk koma fram á deyðan fugl.

Her verður serliga hugsað um fugl framvið strondini, fugl á landi ella í bø og haga.

Talan kann her verða um sjófugl, hagafugl og heimafugl, heilt frá svanum og hegrum til kráku og ravn.

Koma fólk fram á fuglar, sum kunnu verða deyðir orsakað av sjúku, kann ein boða fra starvsstovuni frá, og sum síðani tekur sær víðari av málinum.

– Við tí mynstri fyri útbreiðslu hjá villfugli í Europa eiga vit ikki at gerast bilsin, um fuglakrím verður at finna her á landi við flytifugli í vár einaferð, verður sagt.

# Enn ein søga úr Narnia

**So eru dyrnar inn til bergtakandi ævintýrheimin Narnia enn einaferð latnar upp á føroyskum. Triðja bókin í Narnia røðini hevur heitið Hesturin og drongurin, og aftur hesaferð er tað Bókadeildin, sum gevur út**

NÝGGJ BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í hesi triðju bókini hittast tveir rýmingar og sameinast. Teir royna at sleppa undan einum strævnum lívi í trongum korum, men verða ístaðin miðdepul í ræðuligum bardaga. Einum bardaga, ið avger lagnu teirra og lagnu Narnia.

PaulineBayneshevurmyndprýtt allar Narnia-bøkurnar við sínum eyðkenda stíli, har hon leggur stóran dent á at lýsa smálutirnar.

Tað er Theodor Hansen, sum hevur týtt Hesturin og drongurin til føroyskt.




*Bókadeildin hevur júst givið út triðju Narnia bókina, Hesturin og drongurin*

### Høvuðsverk

Spennandi og humoristisku søgurnar um Narnia eftir C. S. Lewis fara fram í ævintýrheimi, hagar børnini verða førd fyri at taka lut í stríðnum um tað góða og tað ónda; tað góða er umboðað av leyvuni Aslan, og tað ónda av gívrini Jadis. Hurðin til heimin er ígjøgnum eitt skáp. Narnia hevur sína egnu tíðarrokning og alheim, men landslagið líkist tí, vit kenna.

Søgurnar um Narnia verða mettar at vera eitt høvuðsverk í ritverki høvundans, og Bókadeildin fer komandi fýra árini at geva út allar sjey bøkurnar í bókarverkinum. Ætlanin er at geva tvær bøkur út um árið. Í fjør komu tær báðar fyrstu bøkurnar í røðini, Systursonur Gandakallsins og Leyvan, gívurin og klædnaskápið.

### Ævintýrið í veruleikanum

Tað er ikki frítt at Narnia heimurin hevur fingið líka fast tak á børnum og barnsligum sálum, sum Harry Potter fepurin. Tá Leyvan, gívurin og klædnaskápið kom sum filmur í fjør, flokkaðust fjepparar um allan heim til biografarnar, og forvitnið kring Narnia heimin tykist ongan enda at fáa. Nú bjóðar Norðurírska ferðaráðið seg fram at vísa veg í tí veruliga Narnia, Mourne Mountains sunnanfyri Belfast, har C. S. Lewis traðkaði sínar barnaskógvar. Sagt verður, at tað var hetta landslagið, sum var íblásturin, tá hann gandaði fram sína kavakløddu ævintýrverð við tosandi djórum og gátuførum verum av ymsum slag. Í eini lund ber millum annað til at síggja løgna lyktarsteyran í Narnia bókunum, og á einum savnið beint við stendur høvundurin ”sjálvur” við gandakenda klædnaskápið, sum allir Narnia fjepparar kenna.

# Kvæðini liva

**– Ein framúr problematisering av, hvussu tað ber til, at kvæðini ikki vilja seta seg á aftasta bonk í føroyskari mentan, verður sagt um nýggju bókina Endurreisn kvæðanna eftir Sólfin Hansen, Phd. lesandi**

NÝGGJ BÓK

Nýggja føroyska universitetsforlagið, Fróðskapur sp/f, hevur givið út bókina ”Endurreisn kvæðanna – um støðufesti kvæðanna í føroyskum skaldskapi”, ið Sólfinn Hansen hevur skrivað. Hetta er samstundis fyrsta útgávan hjá nýggja forlagnum.

### Nýggjur áhugi

Seinnu árini er áhugin fyri føroysku kvæðunum øktur í stórum. Nýggjar útgávur av kvæðunum síggja dagsins ljós, og ískoyti verða gjørd til tær eldru útgávurnar. Kvæði eru at hoyra í nýggjum hami við nýggjum løgum og framførd á nýggjar hættir, umframt at áhugin fyri siðvandu kvæðaframførslunum aftur er í øking, ikki minst innan skúlagátt.

Kvæðini og teirra aðalframførsla, føroyski dansurin, eru nakað sermerkt fyri føroyska mentan. Í grannalondunum eru kvæðini mest av øllum at meta sum ein fornleivd, ið verður tikin fram av søguligum áhuga. Hvussu ber tað til, at kvæðini ikki fingu somu lagnu sum aðrastaðni, og í hvønn mun standa kvæðini í samband við føroyskan samleika og tjóðskap, eru spurningar, ið hendan bók roynir at svara.

### Ytru og innaru eyðkenni

Bókin kann býtast í tveir høvuðspartar. Søguliga baksýnið og kvæðanna innaru eyðkenni seta fram eitt ástøði um, hvussu kvæðini komu higar til lands, og hvussu skaldskaparformurin er uppbygdur. Kvæðanna ytru eyðkenni og mótstøða mótvegis kvæðunum tæna at seta kvæðini í eitt størri mentanarligt høpi og at lýsa hvussu kvæðini hava hórað undan, hóast kapping við onnur skaldskaparsløg og beinleiðis mótstøðu. Bókin er upprunalig høvuðsritgerð til cand.phil.-prógv á Føroyamálsdeildini.

Sólfinn Hansen er í 2003 útbúgvin cand. mag. í norðurlendskum, serliga føroyskummáliogbókmentum sum høvuðsgrein og søguvísindum sum hjágrein, og bachelor í stjórnmálafrøði. Í løtuni starvast hann sum Ph.D.-stipendiatur í skaldskaparvísind á Føroyamálsdeildini við verkætlan um føroyska kvæðamentan.




*Í bókini Endurreisn kvæðanna kannar Sólfinn Hansen, høvundur, hvussu tað ber til, føroysku kvæðini yvirlivdu, meðan tey aðrastaðni eru vorðin fornleivdir*

### Úr metingini av ritgerðini

Bókin er áhugaverd at lesa og nágreinilig í sínum viðgerðum og endurgávum av søguligum niðurstøðum. Høvundurin ger eftir hvønn partin eina dygga samanfatan. Greitt og nýorðandi verða niðurstøðurnar tiknar ígjøgnum. Ein framúr problematisering av, hvussu tað ber til, at kvæðini ikki vilja seta seg á aftasta bonk í føroyskari mentan.

Bókin fæst til keyps í bókabúðunum.

**ave**